




# Nýggjur samleiki og framsýning

**VITANARSTOVNUR** Í fleiri ár hevur verið arbeitt við at leggja KT-Depilin, Føroya Skúlabókagrunn og Landsmiðstøðina fyri undirvísingaramboð saman

Vilmund Jacobsen

Í fíggjarlógini fyri 2010 vóru hesir tríggir stovnarnir fíggjarliga lagdir saman í eitt rakstrarstað.

Týsdagin komandi bjóða stovnarnir til framløgu á Hoyvíksvegi 72, har nýggi samleikin verður avdúkaður.

Samstundis, sum avdúkingin fer fram, verður ein framsýning latin upp við øllum tí nýggjasta undirvísingartilfarinum, eitt nú nýggjum útgávum, sum verða avdúkaðar og útgávur, sum verða klárar til næsta skúlaár.

Henda dagin verður eisini lagt fram "Veiða vind", sum er tónleikaverk eftir Kára Bæk, søgu eftir Rachel Helmsdal og tekningum hjá Janusi á Húsagarði.

Umframt Bókadeild Føroya Lærarafelags, verður forlagið Sprotin eisini við í framsýningini.

Stovnarnir, sum bjóða til framløguna, nú nýggjur samleiki verður avdúkaður, eru Føroya Skúlabókagrunnur, KT-depilin og Landsmiðstøðin fyri undirvísingaramboð.

Zarepta

## Familjulega fyri fólk við breki

### Høvuðsevnið á leguni: "Kostur, heilsa og broytt lív"

Hjartaliga vælkomin á legu á Zarepta í døgunum 19. - 22. mai 2011

Legan er ætlað øllum, ið bera brek, familjum, stuðlum og hjálparfólkum teirra.

Á leguni, sum verður myndað eftir luttakaraynski, er millum annað:

- fyrilestrar
- andakt
- tónleikur
- ríðing
- spæl úti og inni
- busstúrar
- pallborð
- kvøldsøga
- leikvenjing
- svimjing
- trælist
- gallakvøld
- samtalubólkar
- sangur
- fimleikur
- gongutúrar
- video
- sansarúm

**FYRILESTRAR:**

**Fríggjdag 20. mai**

Kl. 10.00 - John Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum, setur leguna.

Kl. 10.30 - "Kostur, føðsla og rørsla", - Jónhild Busk, fysioterapeutur, og Winnie Simonsen, heilsuráðgevi.

Kl. 15.15 - "Heilsugóðir matpakkar", Hannilena Jacobsen og Bente Kjær, økonmur.

**Leygardagin 21. mai**

Kl. 14.00 – "Lívið broyttist" - Martin Joensen, sangari og tónleikari.

Kl. 19.00 – Gallashow.

**Havið hetta við**

- Dýnuvár, koddavár og lak
- Um tú verður við á túrum og svimjing – heit klæði, gonguskógvar, regnklæði, gummistivlar og svimjiklæði.

**Kostnaður fyri leguna:**

Børn 0-5 ár........100 kr.
Børn 6-14 ár........250 kr.
Vaksin........450 kr.
Foreldur v/børnum í mesta lagi ........1.000 kr.

Konto 6460-156.666.2

Húsið er opið hóskvøldið kl. 19.00
Nátturði verður borðin frá kl. 19.30
Legan verður sett kl. 21.00

Um spurningar eru í sambandi við leguna kann ringjast til Elisabeth Mortensen á tel. 50 45 44

Verið hjartaliga vælkomin aftur í ár! Sigið øðrum frá og bjóðið teimum við! Tilmelding á teldupost: brek@zarepta.fo ella við at ringja 504544 innan 10. mai.

*Vinarliga*
**Zarepta**